FLEIRI LATA SEG HIV-KANNA síða 9

tíðindablaðið sosialurin

7,-

Nr. 230 ★ hósdagur 2. desember 1993

# AMERIKANSKT LOYNISKIP Á HAVNINI



Tað er nærum ómøguligt at fáa nakrar upplýsingar um amerikanska skipið »Persistent«, ið kom á Havnina í ódnarveðrinum mánakvøldið. Tá Tíðindablaðið Sosialurin royndi at fara umborð at fáa eitt prát við skiparan, gjørdi hesin vart við, at vit vóru óynsktir at koma umborð á skipið, eins og allir aðrir gestir eisini eru tað LESIÐ Á SÍÐU 2





## Heidi er einsamøll eftir

Foreldur og systkin eru flutt niður til Danmarkar at vera SÍÐA 8



### Eftir Bordanes-vanlukkuna:

## Norðmenn vilja gera línuskipini tryggari

síða 9

tíðinda sosialurin blaðið

FRÆLSI – JAVNAÐUR – BRØÐRALAG .

66. ÁRGANGUR

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkusstjóri: Kristian Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Bløðfólk: Randi Jacobsen - Bagny Joensen - Tórfinn Smith - Hilmar Jan Hansen - Justinus Eidesgaard

Útgevari: P/f Sosialurin
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bústaður: Argjavegi 26 Argjum
Telefon: 11820

Postadr.: Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefax: 14720

## Kanningarskip undir Føroyum!

Í hesum døgum er ilt at skilja millum, nær talan er um at "siggja" trøll á aljósum degi ella ítøkiligar veruleikar. Hetta hava vit sannað fleiri ferðir í spurninginum um tað nógva bankavirksemið í seinastuni. Hesaferð er tað so ikki um bankar. Tað snýr seg um áhugan fyri tí føroysku undirgrundini. Tað er ikki so langt síðani, at eitt amerikanskt seismiskt skip Arcadian Searcher varð biðið um at fara út úr føroyskum øki, har tað sambært marinuovastan í Føroyum gjørdi ólógligar seismiskar kanningar. Hetta var so seinni víst aftur, hóast marinuovastin kortini stóð við orð síni.

NÚ - og tað er møguliga heilt av tilvild - bert eina viku, áðrenn føroyingar skulu fara at samráðast við altjóða seismisk feløg um at fara undir at gera kanningar við Føroyar - hendir tað, at eitt amerikanskt rannsóknarskip, sum herflotin eigur, men verður útleigað til rannsóknaruppgávur fyri bæði militerið og privatar fyritøkur - verður noytt at leggja inn á Havnina í ódnarveðrinum. Tað er ómøguligt at fáa nakað konkret at vita um skipið, hvat tað ger her og hví. Onkrar keldur vilja vera við, at talan er um eitt skip, sum bæði kann lurta eftir kavbátum, gera kanningar í sjónum og møguliga eisini seismiskar kanningar.

NÚ er eingin orsøk til at fyrigikla sær nakað, sum einki hald er í. Men tað er kortini øll orsøk til hjá føroyingum at vera á varðhaldi, nú so stórur áhugi tykist vera fyri føroyska økinum og møguligari olju her um leiðir. Enn hevur tað ikki ikki eydnast at fáa nakað at vita um skipið, ið nú liggur á Havnini og hvat tað gjørdi við Føroyar, tá skiparin gjørdi av at fara í næstu havn at kroka. Vónandi fer tað at eydnast okkum at fáa fleiri upplýsingar til komandi blað

# Amerikanskt "loyniskip" á Havnini!

Í ódnarverðrinum manakvøldið kom eitt amerikankst skip á Havnina. Skipið eitur "Persistent" og hoyrir til amerikanska flotan. Tað kemur úr Norfólk Virginia. Tíðindablaðið Sosialurin hevur roynt at fáa upplýsingar um skipið, men tað hevur verið nærum ómøguligt. Tá vit í gjár skuldu fara umborð at vita, hvat skipið ger um okkara leiðir fingu vit greið boð frá skiparanum, at vit máttu ikki koma umborð og hann vildi heldur ikki úttala seg til pressuna.

Orsøkin til at hetta skipið vekir serstakan áhuga í Føroyum júst í hesum døgum er tann, at skipið er eitt rannsóknarskip av einumhvørjum slag. Tað hevur stóra rullu fyri aftan við longum leiðingi. Nú er tað so, at tá tú einki fært at vita, so vekir tað mistankar og gitting. Spurningurin er um skipið kann gera seismiskar kanningar og ger slíkar kanningar á okkara leiðum.

Marinustøðin boðar frá, at hon veit einki um skipið annað enn tað Verjukommandoin í Keypmannhavn hevur boðað frá, nevniliga at manningin er komin á Havnina til "rekreation og hvile".

Verjukommandoin í Keypmannahavn hevur heldur ikki fleiri upplýsingar um skipið. Vit hava fingið at vita, at tað er Mærsk í Keypmannahavn, sum er umboð fyri skipið. Umboðsmaðurin hjá Mærsk í Føroyum sigur seg einki vita um hetta skipið annað enn at tað er eitt rannsóknarskip og ger uppgávur fyri bæði milliterið og privatar fyritøkur. Tað skal eitast at gera oceanografiskar kanningar. Á Fiskirannsóknarstovuni siga teir seg einki kenna til skipið.



US Naval Ship Persistent liggur á Havnina til 4. desember. Tað er nærum ómøguligt at fáa at vita, hvat hetta skipið ger um okkara leiðir. Mynd kalmar



*Tíðindablaðið Sosialurin ætlaði sær umborð á amerikanska skipið fyri m.a. at vita, um teir gera seismiskar kanningar, men skiparin vildi ikki loyva pressufólki umborð og eiheldur úttala seg um, hvat skipið gjørdi. -Eg havi forboð fyri at siga nakað, og geri eg tað kortini, so missi eg arbeiðið segði hann, tá tíðindamaður og myndamaðurin Sosialsins vórðu "riknir" í land aftur. Mynd kalmar*

Amerikanska sendistovan í Keypmannahavn hevur heldur ongar upplýsingar. Skiparin, sum var sera fáorðaður, tá vit vóru á bryggjuni í gjár, segði tó somikið sum at teir arbeiða her í Norðuratlantshavi og gera vísindaligar kanningar. Umborð eru 19 mans umframt 9 vísindamenn.

Upp á fyrispurning um teir gera seismiskar kanningar ella líkanndi kanningar í sambandi við undirgrundina sigur skiparin, at tað kann hann einki svara upp á. Ein av vísindamonnunum umborð, sum stóð á dekkinum og arbeiddi segði

*Framhald á síðu 20*

**Toyota Carina**

3 1/2 ára gamal, til sølu fyri 60.000,- kr.
Kostnaður fyrr 170.000,- kr.

**Tlf. 41942**